

Mynd: Jens Kristian Vang

# Savnandi hátíðin

**FØROYINGAR** eru ein tjóð og sum allar tjóðir, eru vit ymisk við ymiskum sjónarmiðum, ymiskum átrúnaðarligum og politiskum áskoðanum og ymiskum áhugamálum. Sum demokratisk tjóð er tað natúrligt, at vit hava ymsar áskoðanir og meiningar. Fólkaræðið, demokratiið, byggir á grundleggjandi meginreglur sum rætt til frítt at hugsa, trúgva, skriva og tala – frítt at velja politiska leiðslu við frælsum og loyniligum valum, har valrættur er fyri øllum yvir ávísan aldur. Fólkaræðið er, sum ein løgtingsformaður plagdi at taka til, tá tingið varð sett, okkara dýrasta ogn, og rætt hevur hann. Vit eiga tí øll støðugt at vera á varðhaldi at verja, styrkja og menna okkara fólkaræði.

**Í FÓLKARÆÐINUM** møtast og brótast ymiskar áskoðanir. Politisku avgerðirnar verða tiknar við meiriluta, antin tað so er, tá vit manna okkara gamla løgting og okkara bý- og bygdaráð ella, tað snýr seg um avgerðir, tiknar á løgtingi ella í bý- og bygdaráðum. Ein av mongum fortreytum fyri, at ein demokratisk tjóð skal mennast og blóma, er, at tjóðin hevur nøkur grundleggjandi felags virði, ið kunnu virka savnandi og sameinandi. Hetta merkir, sum longu nevnt, ikki, at vit eru samd um alt, men hesi felags virði eru hinvegin neyðug júst tí, vit eru ósamd um serstakliga politisk, tjóðskaparlig og átrúnaðarlig viðurskifti.

**FELAGS** virði eru til dømis fólkaræðið, vælferðarsamfelagið og kristintrúgvin í ymsum formum. Hetta kann eisini vera, eitt nú, eitt vaksandi tilvit um umhvørvið og burðardygga menning, serstakliga av høvðusvinnuni og samhaldsfesti úti sum heima. Virði broytast við tíð og umstøðum. Hugsið bert um, hvussu hugburður broytist í sambandi við eitt nú altjóðagerð og globalisering. Fortreytirnar fyri fólkaræðinum broytast sostatt javnt og samt, og fólkaræðinum tørvar sostatt støðugt samfelagsorðaskifti og mennandi og savnandi tættir eins væl og savnandi kreftir av ymsum sløgum. Savnandi tættir eru eitt nú mál, mentan og søga og alt tað, sum hesir tættir fevna um. Hesir hornasteinar í okkara mentan og samleika eru alt tað, ið vit eru felags um, hóast ósamd um ymsar samfelagsspurningar.

**ÓLAVSØKAN** er okkara savnandi hátíð. Hon er ein hornasteinur og helst tann mest markanti parturin av hesum savnandi tættum. Henda hátíð hevur djúpar søguligar røtur heilt aftur um kristniboðan føroyinga. Tá landnámsmenn- og kvinnur tóku land her fyri umleið 1200 árum síðan, høvdu tey við sær siðir, trúgv, mál og mentan úr heimlandinum. Hetta merkir, at her á oyggjunum varð skipað eitt samfelag við altingi, ásatrúgv og vesturnorrønari mentan. Her varð stovnað eitt politiskt frælst land, frístaturin Føroyar, har evsta valdið, Altingið, einaferð um árið varð sett í Tórshavn. Hetta ting hevði lóggávuvald og dómsvald men einki útinnandi vald, og halda tey lærdu, at júst hetta mundi vera ein orsøkin til, at tað gekk aftur á við politiska frælsinum. Norskt kongsvald, ið støðugt strembaði eftir yvirvaldi í Norðurhøvum, gjørdi um ár 1035 enda á føroyska frístatinum og hava vit síðan verið í samríki við ávikavist Noreg og Danmark. Eitt amboðið í hesi imperialistisku tilgongd var kirkjan, ið fekk sera stórt politiskt og búskaparligt vald og átti stórar ognir her í oyggjunum. Tað er sømiligt og neyvan av tilvild, at vit nú, við bæriligari standmynd á Tróndargrund í Norðagøtu, heiðra tann føroying, sum er vorðin ikon og ímynd av stríðnum móti imperialismu í Norðurhøvum.

**ÓLAVUR HALGI** varð av katólsku kirkjuni kosin halgimenni, og so var upplagt at gera deyðadag hansara til ein stóran kristnan hátíðardag. Ólavs vøka gjørdist skjótt ein tann týdningarmesti halgidagur í Norðurlondum. Soleiðis eisini í Føroyum, og hvat var meira hóskandi enn at byrja tingsetuna hendan dagin. Tann 29. juli gjørdist sostatt ein týðandi politiskur merkisdagur, og hetta markeraði samband millum politiskt vald og kirkjuvald. Tað løgting, sum nú, eftir vakra skrúðgongu, hátíðarliga verður sett Ólavsøkudag hevur tí djúpar søguligar og mentanarligar røtur og sigst at vera eitt hitt elsta lóggávuting í heiminum. Hetta pliktar tingmenn at taka tingstarv í størsta álvara.

**TINGLIMIR** hava okkara vælferð í sínum hondum, og hvør einasta avgerð, stór ella lítil, tikin á Føroya løgtingi, ávirkar hvønn einasta føroying. Vónandi eru tingmenn tilvitandi um hetta, og vónandi eru allir tinglimir tilvitandi um ta stóru ábyrgd, ið liggur á herðum teirra. Hetta merkir eisini, at tingmenn eiga at virða tingstarvið og innan sum uttan tinggátt bera seg at við tign og sóma, soleiðis at virðingin millum manna fyri tingstarvinum ikki minkar, men heldur støðugt veksur. Tað er gott fyri fólkaræðið.

**ÓLAVSØKAN** er okkara tjóðhátíð og hon er vorðin ein hin týdningarmesti parturin av samleika okkara sum tjóð, eins og tjóðarhátíðin hevur sera stóran týdning fyri samanhangsmegina í Føroya fólki. Føroyingar eru góðir við ólavsøkuna, og hátíðin hevur veruliga stóran týdning fyri okkum øll. Hon er vøkur, stórfingin og fjølbroytt. Her er gaman og álvara, og ólavsøkan er vorðin stevnan yvir øllum stevnum.

**ÓLAVSØKAN** er tætt knýtt at høvuðsstaðnum, hon er vorðin eitt við Havnina, og Havnin er vorðin eitt við ólavsøkuna. Øll royna, tað besta tey evna, til tess at gera ólavsøkuna so góða sum møguligt, og nýggj tilboð eru mestsum fyri hvørja ólavsøku. Vit í Miðlahúsinum fara eisini at gera okkara til tess, at ólavsøkan skal gerast ein stór uppliving. Vit hava opið hús, og her verður framsýning av skemtitekningum hjá Óla P, tónleikatiltøk, og sýnd verða filmsbrot úr savninum av gomlum Føroyafilmum, sum felagið Substanz við stuðuli frá Eik Banka hevur savnað. Okkara miðlapallar fara at vera livandi alla ólavsøkuna, eitt nú fer Rás2 at senda í fimm dagar, úr býnum, úr Miðlahúsinum og av Nólsoyar Pállstorginum, vit fara at bera tíðindi á Portalinum, og blaðið fer at savna inn tilfar, sum verður prentað eftir ólavsøku. Vit fara soleiðis eisini hesa ólavsøkuna at gera okkara til, at umhvørvið í Vágsbotni stendur sum nakað heilt sermerkt, ein mentanardepil í gomlu Havnini. Her møtast gamalt og nýtt, her eru tilboð av ymsum sløgum, og her er framúr hugnaligt, ein sonn oasa í býarmeldrinum.

Góða ólavsøku, øll somul

*Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri*